# sbotni andar av søgu



*Martin Christian Restorff, sum gjørdist fyrsti fríhandilsmaður aftaná, at Kongaligi handilin var avtikin í 1856*



*Handilshúsini í Vágsbotni, sum M.C.Restorff keypti eftir kongaliga einahandilin í 1856. Her er handilin enn. Saman við Miðlahúsinum! Handilin sær tað sama út í dag sum á myndini*



*Kassaaparatið er frá 1898. Gentan er Anna Restorff, langabbadóttir Andrias í Vágsbotni. Hon er sjeynda ættarlið frá gamla Restorff, sum arbeiðir í hesum handli, nú hon er heima í jólafrí*



*Lampan, sum varð nýtt sum arbeiðsljós umborð á skipi*

systkjum man hava verið Frants Carl Sofus Jacobsen (1863-1940).

Hann var stóran part av lívinum í Nicaragua í Miðamerika, har hann hevði bananplantagu. William Heinesen heldur, at ein kann ímynda sær, at ein slíkur maður hevur verið ein harður harri, men hetta var ikki galdandi fyri Frants. Hann var ein heiðurligur og beskeðin maður, men ein ævintýrari man hann hava verið.

Hann fór longu sum 14 ára gamal at sigla við skipunum hjá Restorff, sum sigldu til Danmarkar við og eftir vøru. Men so fór hann út í heim at sigla. Eina tíð búði hann á eini lítlari tropuoyggj, Corn Island, sum ikki finst á vanligum kortum. Hon var bert ein ferkm til støddar, og tað vóru 40 fjórðingar til næsta fastland. Sambandið var bert við opnum bátum, og tað búðu 5-600 fólk á oynni. Eina ferð hann kom heim at ferðast, hevði hann eina norska konu við sær.

Tey flutti seinni til Danmarkar. Tey høvdu eina adoptivdóttir, sum gav teimum ótøkk sum løn.

Tvey onnur systkin Jørgen Poul (1852-1936) og Fanny Thora Jacobine (1850-1936) vóru ógift og búðu saman í Keypmannahavn alt lívið. Síðan var tað Johanne Franciska f. 1857, sum var ógift.

## C.J.

Hetta er uttan iva Carl Johan Bech, djóralækni, sum gekk nógv inn í handilin.

Mamma hansara Helena f. 1866 var ein systir Aage Jacobsen. Hon giftist Bech við einum stýrmanni úr Ålborg, sum doyði í 1899 í eini roynd at bjarga einum skipsfelaga. Hann hevði orð fyri at vera eitt hampafólk. Ein annar kendur sonur var Otto Bech, handilsmaður.

## Sigurd Bergh 1895

Sigurd var sonur Helenu, elstu dóttir gamla Restorff. Hon fór longu 16 ára gomul til Danmarkar, og longu árið eftir giftist hon við verkfrøðinginum Jacob Johan Jelstrup, sum var nógv eldri enn hon. Hjúnalagið vardi bert fá ár. Tá ið hann doyði, giftist hon við heilsølumanninum við jødiskum blóði Carl Bergh í Keypmannahavn, sum hevði verið forelskaður í henni, áðrenn hon giftist fyrru ferð. Í fyrra hjúnalagnum vóru tvey børn. Hjalmar doyði ungur. Hann hevði hjartafeil. Thora var fødd í 1872. Hennara elsta dóttir Maria giftist við tí kenda arkitektinum við eggstólinum Arne Jacobsen. Dóttirin Estrid, giftist í Írlandi. Hon var søgd at vera fyrimyndin fyri Barbaru í bókini hjá Jørgen Frants Jacobsen. Hann skuldi vera forliptur í henni.

Í seinna hjúnalagnum var eitt barn, og hetta var Sigurd Bergh, sum doyði í 1935. Hann giftist við systkinabarni sínum Else Lützen, systir Valdemar. Hann var sakførari og sera áhugaður í tónleiki.

Hann hevur verið í Føroym og ferðast, og tí er hansara navn komið á glasplátuna.

## Martin Restorff

Martin var elst av børnunum hjá A.W. Restorff. Hann doyði bert 30 ára gamal í 1899, ógiftur.

William skrivar um hann: "Martin var utvivlsomt i mange Maader en mærkelig ung Mand. Han hører til de mange "Fantaster" i den Jacobsenske familie. Han var, kan man sige, Samler og Mystiker."

Hann savnaði myntir og var limur í einum heimsumfatandi brævaskiftisfelag.

## Martin Dahl

Martin var ættaður úr Oyndarfirði og varð seinni maður Ragnhild, dóttir A.W. Restorff. Hann arbeiddi nógv júst í hesum handlinum.

## Kaj Sponholtz

Kaj Sponholt var dani og starvaðist sum kondittari hjá Frants Restorff. Hann stovnaði saman við millum øðrum Andreas Restorff Jacobsen í 1926 dansiorkestrið "Jazzband Triumf", sum seinni gjørdist til "Gágguna." Teir spældu fyrstu ferð alment, tá ið Denna og Kjartan Mohr giftust tann 26/10-1926. Hann hevur uttan iva havt síni ørindi inn higar at tosa um tónleik.

## Caroline Restorff

Caroline var dóttir A.W. Restorff og giftist við Zakarias Heinesen úr Bø. Hetta var undan aldaskiftinum, so henda undirskriftin er so gomul sum tað. Eitt av hennara børnum var William Heinesen. Caroline Heinesen dugdi eisini væl at skriva. Hon skrivaði endurminningar, sum vórðu prentaðar í FF-blaðnum um ársskiftið 2002/2003. Hon hevur eisini verið brúkt sum kelda í fleiri av frásøgnunum í røðini Hendur ið Sleptu.

## Vælkomin at hyggja

Í handlinum er eisini eitt gamalt kassaapparat, sum stavar frá 1898. Hetta tykist at vera sera framkomið við kundateljara. Framleiðarin hevur í hvussu er verið framskygdur. Tað kundu sláast upp kr. 299,99 á kassaapparatið. Tað hevur í nógv ár verið nóg mikið.

Ein av lampunum í handlinum er eitt arbeiðsljós, sum varð brúkt umborð á skipi, áðrenn nakað var, sum kallaðist ravmagn umborð.

Tey fryntliga starvsfólkini hjá Andr. í Vágsbotni siga, at fólk eru vælkomin at hyggja inn á gólvið, har tey kunnu kunna seg um hendan partin av okkara søgu.

Vit ynskja teimum eisini eini gleðilig jól.

*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*